# oyskur truckari




Orðið “trucker” verður í USA og Kanada nýtt um førarar av lastbilum, sum koyra langvegis og eru heimanífrá í fleiri dagar. Jacob Edmund Jacobsen á Strondum er faktiskt ein ektaður truckari, sum koyrir upp á langfart í Føroyum.

Tað kemur ofta fyri, at hann t.d. fer heimanífrá sunnudag seinnapart og er ikki heima aftur fyrr enn hósdag. Hann koyrir vanliga kring alt landið við ísfiski fyri Faroe Seafood. Koyringin millum tey ymisku fiskavirkini í landinum ger, at hann ofta yvirnáttar umborð á Smyrli tvær til tríggjar nætur í somu viku.

Jacob Edmund sigur, at teir eru ofta fleiri lastbilaførarar, sum yvirnátta umborð á Smyrli. Har hava teir tað sera hugnaligt og stuttligt eftir loknan arbeiðsdag, og gott samanhald er millum bilførararnar.

Í nøkur ár koyrdi Jacob Edmund hjá OCD í Saltangará, men seinastu tvey árini hevur hann verið bilførari hjá Faroe Ship. Hann koyrir út frá landingarmiðstøðini á Beta í Runavík, men hann koyrir eisini annan farm. Bilurin er ein tvey ára gamlan Scania R500, sum hann sjálvur koyrir fast og passar sum sítt egna barn.

Bilurin er sera snøggur bæði uttan og innan. Tað fyrsta ein leggur til merkis, á veg inn í bilin, er eitt skelti, har tað stendur, at ikki er loyvt at koma inn í skóm. Skógvarnir skulu setast í ovasta trinbrettið, síðan verður hurðin latin aftur, og trinbrettið verður brúkt sum skógvahill. Skógvarnir standa turrir, hóast tað regnar. Bilurin hevur annars flatskerm við DVD, kaffimaskinu, køliskáp og frystiboks. Eisini hevur hann ein sendara við 40 kanalum, soleiðis at hann kann tosa við aðrar lastbilførarar.

Jacob Edmund sigur, at tað er soleiðis, at konan og børnini eru ofta við í bilinum, tá ið hann er til arbeiðis. Tá hann er leingi heimanífrá, hava tey brúk fyri at vera saman sum familja. Bilurin hevur tvær koyggjur í førarahúsinum, og har eru bæði trygdarbelti og trygdarnet, so tað er fullkomiliga trygt hjá børnunum at vera har.

## Ársins Truckari

Tá Jacob Edmund var til Trucker Festivalin 2008 í Klaksvík, varð bilurin kosin “Ársins Trailari”, og sjálvur varð hann kosin “Ársins Truckari”.

Á festivalinum í fjør varð kassin á bilinum nýttur sum kafé hjá teimum vitjandi, har fólk kundu keypa sær kaffi og køkur og annars hugna sær saman. Sum skilst, verður meira gjørt burturúr í ár. Bilur hjá Jacob Edmundi fær eitt serligt pláss á festivalinum, og umhvørvið kring bilin verður gjørt innbjóðandi og hugnaligt.

Tá vit spurdu Jacob Edmund um, hvat tað er sum ger at hann møtir so trúliga til Trucker Festivalarnar, sigur hann, sum so nógvir aðrir lastbilaførarar, at hann heldur at tað hevur stóran týdning at koma saman við øðrum ”kollegum”. Serliga til ein slíkan festival, tá allir hava frí,og hava bilarnar við. Har kunnu teir slappa av og práta saman um tað, sum hevur teirra felags áhuga.

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*